## Aftur ein ráðharri frá

Tey flestu væntaðu, at ráðharraskiftið í bretsku stjórnini herfyri fór at geva stjórnini arbeiðsfrið, men so varð ikki. Seint í gjárkvøldið kunngjørdi ráðharrin Kitty Usher, at hon hevði gjørt av at leggja frá sær, eftir at fjølmiðlarnir hava lagt hana undir at hava snýtt skattavaldið, tá hon seldi síni hús fyri tveimum árum síðani. Sjálv heldur hon uppá, at hon hevur ikki gjørt nakað skeivt, men at hon kortini hevur valt at fara frá fyri ikki at órógva stjórnina. Kitty Usher er fyribils tann seinasti í einari heilari røð av ráðharrum, sum er farnir úr stjórnini hjá Gordon Brown tær seinastu vikurnar.



## Irak ørkymlað av Iran

Tann spenta støðan í Iran við áhaldandi mótmælisgongum í høvuðsstaðnum Teheran elvir til stúran í grannalandinum Irak. Tað sigur irakski uttanríkisráðharrin, sum tó leggur dent á, at Irak virðir tær avgerðir, sum leiðslan í Iran tekur. Hoshiyar Zebari, uttanríkisráðharri, váttar fyri Reuters-tíðindastovuni, at óvissan og tann støðan í Iran ørkymla stjórnina í Bagdad. Mótmælini í Iran eru tey harðastu síðani ta islamsku kollveltingina í 1979. Fá ár seinni brast kríggj á millum stýrið hjá Saddam Hussein í Irak og prestastýrið í Iran. Tað vardi fleiri ár og kravdi nógv mannalív.

# Fiskaprísirnir hava verið heldur frægari

**Sambært tølum hjá Fiskamarknaði Føroya hava ávísir fiskaprísir verið heldur frægari í seinastuni, enn teir annars hava verið seinastu tíðina. Vit hava hugt at, hvat fiskurin varð seldur fyri á marknaðinum í gjár**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hyggja vit at tølum yvir gólv-og telefonsøluhjá Fiskamarknaði Føroya í gjár, var besti prísurin á toski1 stívliga 20 krónur fyri kilo. Lakasti prísurin fyri somu fiskastødd var 14 krónur fyri kilo. Miðalprísurin á toski1 var 17,87 fyri kilo.

Taka vit hinar toskastøddirnar, var miðalprísurin á toski2 15,91 fyri kilo, meðan toskur 3, 4 og 5 fóru fyri miðalprísin 12,25, 11,04 og 9,53 fyri kilo.

Størsta hýsan fór í gjár fyri 17 krónur fyri kilo, og lægsti prísur á bestu hýsustøddini var 6 krónur fyri kilo.

Miðalprísurin á hýsu 1, 2, 3 og 4 var ávikavist 12,34, 11,12, 11,50 og 7,06 krónur fyri kilo.

Nú fleiri bátar hava fiskað hvíting, kunnu vit eisini nevna prísirnar á hvítingi í gjár.

Besti prísur á hvítingi1 var 9 krónur fyri kilo og á hvítingi2 var hann eisini 9 krónur.

Miðalprísurin fyri hvíting í gjár var 8,38 fyri hvíting1 og 8,30 fyri kilo av hvítingi2.

Lægsti prísur á hvítingi í gjár var 5 krónur fyri kilo.

### Brosma og longa

Vit kunnu eisini nevna prísirnar á brosmu og longu, sum serliga línuskipini liggja eftir – ikki minst, nú fiskiskapurin eftir toski og hýsu yvirhøvur hevur verið slakur.

Besti brosmuprísurin í gjár var 5,80 krónur fyri kilo, meðan bestu prísir annar lógu rundan um 5.

Miðalprísurin fyri ymisku støddirnar lá millum 3,50 og 5,55 fyri kilo.



*Besti toskaprísurin á Fiskamarknaði Føroya í gjár lá omanfyri 20 krónur – og lægsti prísur var 5 krónur fyri kilo*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Taka vit longu, var besti prísur á marknaðinum í gjár 9,30 fyri kilo, meðan miðalprísurin annars lá úr 4,56 upp í 8,23 krónur fyri kilo. Flestu prísir lógu teir úr 6 krónum og uppeftir.

Nú trolbátar fiska á landleiðini, kunnu vit eisini taka prísirnar á havtasku, sum í gjár lógu úr 17,50 upp í 25,40 krónur fyri kilo. Besti miðalprísur á havtasku var fyri havtasku2 sum var 24,03 krónur fyri kilo.

Besti prísur á kalva var 58 krónur – og lægsti prísur 25 krónur fyri kilo.

# Fleiri keyparar gera ikki søluna verri

**- Fiskaprísirnir vóru kvinkaðir nakað uppeftir aftur, men í morgun vóru sølurnar aftur vánaligar. Tað er útboð og eftirspurningur, sum avger prísirnar, og sjálvandi hevði tað ikki verið verri við fleiri keyparum og størri kapping um fiskin, sigur Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað er altíð gott fyri fiskaprísirnar, tá eftirspurningurin er stórur. Fleiri keyparar gera ikki søluna verri, sigur Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya ásannar, at ávísir prísbatar hava verið í seinastuni, men í morgun kom aftur stígur í, og fiskaprísirnir vóru sum heild vánaligir.

Hann sigur, at tað gongur illa at fáa líkinda prís fyri flatfisk og havtasku, nú bátar eru á landleiðini, og meginparturin av veiðini hjá teimum er flatfiskur.

- Tað er kappingin – útboð og eftirspurningur – sum avgera prísirnar, bæði her heima og uttanlands, og vit hava skilt, at væl av fiski kemur á útlendsku marknaðirnar í løtuni.

Hann ásannar, at tað gekk trekt at selja í morgun, og hetta harmar eisini tey á Fiskamarknaði Føroya, nú útlit annars hava verið til batar.

- Summartíðin er ikki vanliga tíðin, har fiskaprísirnir hækka, men nú prísirnir hava verið so lágir, vóru vónir um, at teir batar, sum hómaðust, fóru at vísa seg frameftir, sigur hann.

Høgni Hansen sigur, at tunga, sum er ein týðandi partur av veiðini hjá trolbátunum, hevur ligið sera lágt í prísi.

- Hetta er ein fiskur, sum vanliga hevur góðan prís, men so er ikki í løtuni. Tað eru tí teir, sum frysta tungu og goyma hana, til teir seinni í heyst ella út á veturin vænta sær betri prís fyri hana. Hetta bindur pening og gongur soleiðis eisini útyvir prísirnar.

### Størri eftirspurningur

Spurdur, um prísirnir høvdu verið betri, um fleiri keyparar meldaðu seg, sigur Høgni Hansen, at sjálvandi hevði tað tænt prísunum, um størri kapping hevði verið um fiskin.

- Tað er altíð gott fyri fiskaprísirnar, tá eftirspurningurin er stórur. Fleiri keyparar gera ikki søluna verri, leggur hann aftrat.